

Av 16 nýggjum oljuøkjum, eru tað bert tvey økir sum loysa seg fíggjarliga. Annað er Johan Sverdrup, ið myndin er frá. Mynd: Øyvind Hagen/Statoil

# Í løtuni loysir seg ikki at leita eftir meir olju

**Jógvan Hugo Gardar**

26.08.2015 - 22:41

Oljan.fp>

Í kvøld liggur prísurin á Norðsjóvaroljuni Brent á umleið 43,50 dollarar fyri fatið. Við hesum prísinum er tað næstan einki oljuøki sum í løtuni ber seg fíggjarliga. Við prísinum í dag vil neyvan nakað oljufelag byrja nýggja oljuframleiðslu.

Tað er eingin ivi um at vit dagsins oljuprísi, so er tað ikki lætt at taka avgerð um at fara undir oljuframleiðslu, sigur Espen Erlingsen, greinari hjá Rystad Energy, í samrøðu við Bergens Tidende.

Rystad Energy ger javnan metingar sum vísa hvat oljuprísurin má vera fyri at tað skal loysa seg hjá oljufeløgunum at fara undir nýggja olju- og gassframleiðslu. Í løtuni eru bara myrk skýggj á himmalhválvuni.

Sambært Rystad Energy so hava oljufeløgini farna árið framt umfatandi sparingar, men trupulleikin er at oljuprísurin lækkar skjótari og meir enn tað oljufeløgini megna at spara.

Sambært greiningarfyritøkuni so eru av teimum 16 oljuøkjunum á norska landgrunninum, sum ætlandi skulu byrja at framleiða olju ella gass, so eru tað bara tvær ætlanir sum vil bera seg fíggjarliga við einum oljuprísi sum liggur millum 43 og 44 dollarar.

Oljurisin Johan Sverdrup, ið skal framleiða tað sum svarar til 2460 milliónir oljulíkar er annað av økjunum sum tola dagsins oljuprís